Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinir Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Koppseting av útisetum

Spurningar:

1. Hava føroyingar, ið eru búsitandi uttanlands, men í løtuni staddir í Føroyum, møguleika at bíleggja tíð til koppseting í Føroyum?
2. Um ikki, hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera hetta møguligt?

Viðmerkingar:

Undir koronutíðini hava nógv føroysk lesandi og onnur, ið dagliga búgva uttanlands, verið í Føroyum orsakað av koronustøðuni. Skúlar hava latið aftur, og øll undirvísing hevur verið á netinum, og tí hava nógv valt at koma heim til Føroyar.

Nú koppsetingin er í gongd, verður lýst við, at øll búsitandi í Føroyum kunnu bóka sær tíð til koppseting.

Tað reisir spurningin, hvussu støðan er hjá teimum mongu føroyingunum, ið eru búsitandi uttanlands, men sum orsakað av koronustøðuni eru stødd í Føroyum.

Í Danmark hava føroyingar, ið eru búsitandi í Føroyum, men eru staddir í Danmark í útbúgvingarørindum ella øðrum, møguleika at koppseta seg júst sum aðrir borgarar í Danmark.

Spurningurin er tí, um hesin møguleikin eisini verður galdandi fyri teir útisetar, ið eru heima í Føroyum í løtuni. Tí verður hesin spurningurin settur.

Á Løgtingi, 23. apríl 2021

Beinir Johannesen